# Frágreiðing frá Barnaverndastovu Føroya 2013
## - grundað á hagtøl frá barnaverndartænastunum og Fosturforeldraskipanini

## Innihald

1. UPPBÝTI Í BARNAVERNDARTÆNASTUR ........ 2
2. HVUSSU BYRJA BARNAVERNDARMÁLINI ........ 6
3. FÍGGING – KOSTNAÐUR AV BARNAVERND ........ 11
4. FOSTURFORELDRASKIPANIN ........ 16
6. MANNAGONGD OG GRUNDARLAG ........ 20

# 1. Uppbýti í barnaverndartænastur

Barnaverndarlógin ásetur, at landið skal skipast í barnaverndarøki ella **barnverndartænastur (BVT),** sum er felagsheitið fyri barnaverndarnevnd og barnaverndarumsiting. Orsøkin til, at barnaverndarlógin áleggur smærri kommunum at samstarva í barnverndarmálum, er, at talan er um trupul og viðkvom mál.

Áðrenn verandi barnaverndarlóg kom í gildi, vóru trupulleikar við ógegni og rættartrygd, sum vóru umráðandi at fáa loyst. Mett varð, at størri eindir við skikkaðum fólki í umsitingini var gongda leiðin.

Føroyar vóru til og við 2013 býttar upp í 10 barnaverndarøki við í minsta lagi 1500 íbúgvum í hvørjum øki. Lágmarkið fyri eitt øki er síðani hækkað til 3000 íbúgvar, og hevur tað havt við sær, at øki eru løgd saman, so talið á barnaverndartænastum nú er lækkað niður í átta øki. Henda frágreiðing fevnir um árið 2013, og barnaverndarøkini eru tí 10 í tali í frágreiðingini eins og í undanfarnum ársfrágreiðingum.

**Talva 1: Uppbýti í barnaverndartænastur**

| **Barnaverndarøki til og við 2013** | **Kommunur** | **Barnaverndarøki frá og við 2014** |
|---|---|---|
| Barnaverndartænastan í Tórshavn | Tórshavnar | Barnaverndartænastan í Tórshavn |
| Barnaverndartænastan við Skálafjørðin | Nes<br>Runavíkar<br>Sjóvar | Barnaverndartænastan við Skálafjørðin |
| Barnaverndartænastan í Norðuroyggjum | Fugloyar<br>Klaksvíkar<br>Kunoyar<br>Viðareiðis<br>Hvannasunds<br>Húsa | Barnaverndartænastan í Norðuroyggjum |
| Barnaverndartænastan í Sandavági | Kvívíkar<br>Vestmanna<br>Vága<br>Sørvágs | Barnaverndartænastan í Sandavági |
| Barnaverndartænastan í Sunda kommunu | Eiðis<br>Sunda | Barnaverndartænastan í Sunda kommunu |
| Suðuroyar Barnaverndartænasta | Hvalbiar<br>Tvøroyrar<br>Fámjins<br>Hovs<br>Sumbiar | Suðuroyar Barnaverndartænasta |
| Suðuroyar sunnara Barnaverndartænasta | Porkeris<br>Vágs | |
| Barnaverndartænastan í Eysturkommunu | Eysturkommuna | Barnaverndartænastan í Eysturkommunu og Fuglafirði |
| Barnaverndartænastan í Fuglafirði | Fuglafjarðar | |
| Sandoyar Barnaverndartænasta | Skopunar<br>Sands<br>Skálavíkar<br>Húsavíkar<br>Skúvoyar | Sandoyar Barnaverndartænasta |




Við árslok 2013 vóru 864 barnaverndarmál skrásett fyri Føroyar í hagtalsskipanini hjá Barnaverndarstovu Føroya.

Barnaverndarmál eru sera ymisk, og munur er á, hvussu arbeiðskrevjandi einstøku barnaverndarmálini eru. Málini kunnu snúgva seg um einfalda ráðgeving, men eisini um børn, sum verða sett heiman móti viljanum hjá foreldunum, sokallað umsorganaryvirtøka uttan samtykki. Tí ber illa til at samanbera støðuna í ymsu barnaverndartænastunum, tí talið eitt einstakt ár í sjálvum sær sigur ikki so nógv um støðuna. Sum frálíður fara hagtølini at vísa, um talið á barnaverndarmálum broytist, og um fyrsiskipanirnar, barnaverndartænasturnar seta í verk, tæna endamálinum.

Hagtalsskrásetingin er skipað soleiðis, at hvørt barnið sær er skrásett sum eitt mál. Tað merkir, at sama familja kann vera skrásett sum fleiri barnaverndarmál í skipanini, um stuðul verður veittur fleiri børnum í somu familju.

Undanfarin ár hevur verið galdandi, at børn kundu halda fram í skipanini, eftir at tey vóru fylt 18 ár, um serligar umstøður talaðu fyri tí. Tó kundu tey í mesta lagi halda fram í barnaverndartænastuni til 21 ára føðingardagin. Aldursmarkið varð í 2012 hækkað til 23 ár. Henda broyting sæst aftur í hesi frágreiðing fyri 2013 og hevur við sær, at fyrivarni skal takast, um samanborið verður við frágreiðingar fyri undanfarin ár.

**Talva 2: Tal av barnaverndarmálum, 31.12.2013**

| | Barnaverndarøki | Gentur | Dreingir | Tils. | Barnatal í økinum | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 170 | 186 | 356 | 6.706 | 5,3 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 51 | 68 | 119 | 1.827 | 6,5 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 52 | 46 | 98 | 2.003 | 4,9 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 13 | 18 | 31 | 474 | 6,5 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 19 | 17 | 36 | 822 | 4,4 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 57 | 35 | 92 | 1.528 | 6,0 |
| 7 | BVT, Sandoy | 11 | 12 | 23 | 374 | 6,1 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 22 | 35 | 57 | 902 | 6,3 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 17 | 19 | 36 | 670 | 5,4 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 7 | 9 | 16 | 478 | 3,3 |
| Alt landið | | 419 | 445 | 864 | 15.784 | 5,5 |

Viðmerkjast skal, at av teimum 864 málunum eru 100 (57 gentur og 43 dreingir) í aldursbólkinum 18-22 ár.

Talvan vísir, at mál í % av barnatalinum er 5,5 fyri alt landið. Størsta økið, Tórshavn, liggur við 5,3% beint undir samlaða talinum fyri alt landið. Av teimum størru økjunum annars hava Norðoyggjar (6,5%) og Sandavágsøkið (6,0%) lutfalsliga eitt sindur fleiri mál í mun landstalið, meðan Skálafjørður (4,9%) hevur lutfalsliga eitt sindur færri mál í mun landstalið. Til tey størri økini verða her roknað tey øki, sum hava fleiri enn 1000 børn.

Í teimum smærru økjunum, sum hava færri enn 1000 børn, hava Fuglafjarðar Kommuna (6,5%), BVT Suðuroy (6,3%) og Sandoy (6,1%) fleiri barnaverndarmál í mun til barnatalið enn landið sum heild. BVT í Eysturkommunu, Suðuroyar sunnara og Sunda kommuna hava færri mál í mun til landið sum heild.

**Talva 3: Tal av barnaverndarmálum í % av barnatali við árslok 2010-2013**

| Barnaverndarøki | 2010 | 2011 | 2012 | 2013 |
|---|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 4,3 | 4,8 | 5,4 | 5,3 |
| BVT, Norðoyggjar | 5,2 | 5,0 | 7,4 | 6,5 |
| BVT, Skálafjørðurin | 3,8 | 4,3 | 4,8 | 4,9 |
| BVT, Fuglafjørður | 4,7 | 6,7 | 7,2 | 6,5 |
| BVT, Sunda kommuna | 5,1 | 5,0 | 4,3 | 4,4 |
| BVT, Sandavágur | 2,8 | 3,8 | 5,7 | 6,0 |
| BVT, Sandoy | 7,6 | 8,6 | 5,4 | 6,1 |
| BVT, Suðuroy | 6,2 | 4,9 | 5,3 | 6,3 |
| BVT, Eysturkommuna | 3,2 | 4,5 | 5,7 | 5,4 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | 5,6 | 5,7 | 6,0 | 3,3 |
| Alt landið | 4,4 | 4,8 | 5,6 | 5,5 |

Talva 3 sýnir gongdina seinastu fýra árini fyri tal av barnaverndarmálum í mun til íbúgvatalið fyri aldursbólkin. Her skal gerast vart við, at aldursbólkurin seinasta árið er víðkaður við tveimum árum: frá 0-20 árum til 0-22 ár. Hetta merkir, at %-tølini fyri 2013 høvdu verið eitt sindur hægri, um somu reglur vóru

galdandi, sum árini frammanundan. Tó er gongdin tann, at vøksturin í málum í mun til barnatal, sum sást trý tey fyrstu árini, er flatnaður ella mestsum steðgaður.

**Talva 4: Tal av barnaverndarmálum býtt á aldur og kyn, 31.12.2013**

| Aldur | Gentur | Dreingir | Tils. | Børn í aldursbólki | Mál í % av barnatali |
|---|---|---|---|---|---|
| 0-6 | 68 | 92 | 160 | 4.491 | 3,6 |
| 7-13 | 164 | 199 | 363 | 5.049 | 7,2 |
| 14-18 | 130 | 111 | 241 | 3.546 | 6,8 |
| 19-22 | 57 | 43 | 100 | 2.698 | 3,7 |
| Alt landið | 419 | 445 | 864 | 15.784 | 5,5 |

Á talvuni omanfyri sæst, at talið á barnaverndarmálum í mun til barnatalið í landinum er hægst í aldursbólkinum 7-18 ár, har talið liggur um 7%.

Aldursbólkurin 19-22 ár umboðar tey ungu, sum av ymsum ávum enn eru í skipanini, t.d. at tey eru við at gera miðnámsskúlan lidnan. Eisini kunnu ungar mammur við tørvi á serligari hjálp vera í hesum bólki. 3,7% av føroyingum í hesum aldursbólki eru framvegis fevndir av barnaverndarlógini.

## 2. Hvussu byrja barnaverndarmálini

Barnaverndarlógin fevnir sambært lógarviðmerkingunum bert um børn, ið liva undir viðurskiftum, sum kunnu skaða teirra heilsu og menning. Við nýggju barnaverndarlógini ynskti lóggevarin, at barnaverndartænasturnar skulu fáa møguleika at savna sína orku um tey børn í samfelagnum, sum hava tørv á stuðli og hjálp. Tí fevnir barnaverndarlógin ikki um trivnaðin hjá børnum yvirhøvur, og fevnir heldur ikki um brekað børn uttan so, at tey liva undir umstøðum, sum skaða teirra heilsu og menning.

Fyri at tryggja, at barnaverndartænasturnar fáa kunnleika um børn, sum liva undir viðurskiftum, ið ikki eru nøktandi, er fráboðanarskylda ásett í barnaverndarlógini.

Lógin sigur, at øll hava fráboðanarskyldu, men skilir tó millum vanliga borgaran, ið kann verða ónavngivin, og tann, sum í starvi sínum hevur við børn at gera. Í seinna førinum er kravið, at fráboðanin skal vera navngivin. Í 2012 var barnaverndarlógin endurskoðað, og hevði tað við sær, at fráboðanarskyldan hjá fakfólki frá 1. juli 2012 var herd. Fakfólk hava skyldu til at fráboða barnaverndartænastuni, um so er, at tey hava kunnleika til ella orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir lógini.

Ásett er nú eisini, at barnaverndartænastan skal boða fráboðara frá, hvørt fráboðanin er móttikin.

Fráboðanarskyldan í Barnverndarlógini:

> *§ 14. Øll, sum í starvi sínum hava við børn at gera, og sum í hesum sambandi fáa kunnleika til viðurskift ella hava orsøk til at halda, at viðurskifti eru, sum krevja, at komið verður uppí eftir hesi lóg, hava skyldu til navngivin at boða barnaverndartænastuni frá hesum. Fráboðanarskyldan sambært hesum stykki verður sett fram um ásetingarnar í øðrum lógum um tagnarskyldu í viðkomandi yrkjum.*
>
> Stk. 2. *Tann, ið fær kunnleika til, at foreldur ella annar uppalari vanrøkir, meinslar ella misnýtir eitt barn, ella at barnið á annan hátt livir undir viðurskiftum, ið kunnu skaða tess sálarligu ella likamligu heilsu ella menning, hevur skyldu til at boða avvarðandi barnaverndartænastu frá hesum. Fráboðarin kann vera ónavngivin.*
>
> *Stk. 3. Fráboðast skal eisini viðvíkjandi kvinnum, ið er við barn, tá ið mett verður, at tørvur er á stuðli sambært hesi lóg, t.d. vegna rúsevnismisnýtslu, sosialum ella sálarligum ávum.*
>
> *Stk. 4. Barnaverndartænastan skal sum skjótast, og seinast innan eina viku, ganga ígjøgnum innkomnar fráboðanir og meta um, hvørt kanningar skulu setast í verk sambært hesi lóg, sí §§ 45og49.*
>
> *Stk. 5. Barnaverndartænastan skal boða fráboðara sbrt. stk. 1 frá, hvørt fráboðanin er móttikin.*

Ein fráboðan sambært hesi grein merkir ikki, at barnaverndartænastan hevur skyldu at seta fyriskipanir í verk. Barnaverndartænastan hevur bert skyldu at kanna og upplýsa málið, og um komið verður fram til, at grundarlag ikki er fyri at seta fyriskipanir í verk, skal barnaverndartænastan onki gera.

**Talva 5: Nýggj barnaverndarmál í mun til barnatalið. 2012 og 2013**

| Barnaverndarøki | | Gentur | Dreingir | Tils. | Barnatal í økinum | Mál í % av barnatali | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 39 | 39 | 78 | 6.706 | 1,2 | 1,8 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 10 | 16 | 26 | 1.827 | 1,4 | 2,1 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 12 | 8 | 20 | 2.003 | 1,0 | 1,7 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 2 | 2 | 4 | 474 | 0,8 | 2,0 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 7 | 3 | 10 | 822 | 1,2 | 1,7 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 7 | 8 | 15 | 1.528 | 1,0 | 3,0 |
| 7 | BVT, Sandoy | 4 | 2 | 6 | 374 | 1,6 | 1,4 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 2 | 1 | 3 | 902 | 0,3 | 1,1 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 1 | 1 | 2 | 670 | 0,3 | 1,9 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 1 | 0 | 1 | 478 | 0,2 | 1,5 |
| Alt landið | | 85 | 80 | 165 | 15.784 | 1,0 | 1,9 |

Talva 5 vísir, hvussu nógv nýggj barnaverndarmál, býtt á kyn, eru skrásett í økjunum í 2013. Tilsamans eru skrásett 165 nýggj mál í árinum – 80 dreingir og 85 gentur. Fyri at kunna samanbera økini er talið á nýggjum málum fyri hvørt økið sett í mun til barnatalið í økinum. Samlaða talið av nýggjum málum í mun til barnatalið í øllum landinum var 1,0%.

Barnaverndartænasturnar í Tórshavn, Norðoyggjum, Sunda kommunu og Sandoy hava lutfalsliga fleiri nýggj barnaverndarmál enn galdandi er fyri alt landið. Barnaverndartænasturnar í Skálafirði og Sandavági liggja á sama støði sum miðal fyri landið, meðan BVT í Fuglafirði, Suðuroy, Eysturkommuna og Suðuroyar sunnara hava færri nýggj mál enn landið sum heild.

Um samanborið verður við 2012, sæst, at talið á nýggjum málum er nógv minkað í 2013. Henda gongd sæst í øllum økjum uttan Sandoy, har ein lítil hækking hevur verið í mun til 2012.

**Talva 6: Endað mál 2013**

| | Barnaverndarøki | Gentur | Dreingir | Tils. | Barnatal í økinum | Mál í % av barnatali | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 36 | 34 | 70 | 6.706 | 1,0 | 0,8 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 5 | 6 | 11 | 1.827 | 0,6 | 3,4 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 9 | 8 | 17 | 2.003 | 0,8 | 1,7 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 3 | 2 | 5 | 474 | 1,1 | 0,7 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 6 | 7 | 13 | 822 | 1,6 | 0,8 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 4 | 4 | 8 | 1.528 | 0,5 | 2,0 |
| 7 | BVT, Sandoy | 0 | 1 | 1 | 374 | 0,3 | 1,7 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 1 | 0 | 1 | 902 | 0,1 | 1,0 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 0 | 2 | 2 | 670 | 0,3 | 0,2 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 0 | 0 | 0 | 478 | 0,0 | 1,7 |
| Alt landið | | 64 | 64 | 128 | 15.784 | 0,8 | 1,3 |

Talva 6 vísir, hvussu nógv mál eru endað í 2013. Fyri alt landið vórðu 128 barnaverndarmál endað í 2012, harav 64 vóru gentur og 64 vóru dreingir.

Um samanborið verður við 2012, sæst, at samlaða talið á endaðum málum er minkað munandi í 2013. Ymiskt er tó, um samanborið verður við 2012, fyri hvørt økið sær. Tá sæst, at barnaverndartænasturnar í Tórshavn, Fuglafirði, Sunda kommuna og Eysturkommuna hava endað fleiri mál í 2013, meðan hinar seks barnaverndartænasturnar hava endað færri mál.

**Talva 7: Hví enda mál? 2013**

| Hending | Tal | % |
|---|---|---|
| Barnið er fylt 18 ár | 7 | 5,5 |
| Endamálið rokkið | 32 | 25,0 |
| Familjan flytir av landinum | 14 | 10,9 |
| Fyriskipan nyttuleys | 4 | 3,1 |
| Passiv | 29 | 22,7 |
| Systkin - ikki aktiv í skipanini | 4 | 3,1 |
| Viðurskiftini í heiminum eru blivin góðkend | 34 | 26,6 |
| Víst til annan myndugleika | 4 | 3,1 |
| Tilsamans | 128 | 100,0 |

Av talvuni omanfyri sæst, at meira enn helmingurin av málum, sum vórðu endað í 2013, endaðu, tí at endamálið við fyriskipanini var rokkið, ella tí at viðurskiftini í heiminum vórðu góðkend.

**Talva 8: Hvør fráboðar? 2013**

| Fráboðari | Íalt | %-býti |
|---|---|---|
| Foreldramyndugleikin | 62 | 24,5 |
| Skúli | 36 | 14,2 |
| Barnaverndartænastan tekur málið upp sjálv | 24 | 9,5 |
| Løgreglan | 23 | 9,1 |
| Heilsusystir | 22 | 8,7 |
| Dagstovnar og dagrøkt | 19 | 7,5 |
| Familja ella onnur, sum kenna familjuna | 14 | 5,5 |
| Onnur | 13 | 5,1 |
| Annað barnaverndarøki | 11 | 4,3 |
| Psykiatriski depilin | 10 | 4,0 |
| Foreldur uttan foreldramyndugleika | 6 | 2,4 |
| Kommunulækni | 3 | 1,2 |
| Barnið sjálvt | 3 | 1,2 |
| Onnur í heilsuverkinum | 3 | 1,2 |
| Ljósmóðir | 2 | 0,8 |
| Almannastovan | 1 | 0,4 |
| Frítíðarskúli | 1 | 0,4 |
| **Tilsamans** | **253** | **100,0** |

GG: Til ber at skráseta meira enn ein fráboðara fyri hvørt mál.

Á talvu 8 sæst, at 24,5% av teimum, sum fráboða eitt barnaverndarmál, eru tey, sum hava foreldramyndugleikan av barninum. Foreldramyndugleikin er sostatt størsti einstaki bólkur av fráboðarum. Leggja vit afturat foreldur uttan foreldramyndugleika (2,4%), familju og onnur, sum kenna familjuna (5,5%), sæst, at útvið ein triðingur (32,4%) av øllum fráboðanum koma úr privata umhvørvinum hjá barninum.

Hin parturin (67,6%) av fráboðanum kemur frá yrkisliga umhvørvinum, sum barnið beinleiðis ella óbeinleiðis kemur í samband við. Tann yrkisbólkurin, sum fráboðaði oftast í 2013, var skúlin, ið stóð fyri 14,2% av øllum fráboðanum.

## Barnið sum offur og hættislig atferð hjá barni

Skeivleikar, sum gera um seg í barnaumsorgan og uppaling, kunnu verða býttir í tveir flokkar: harðskap og vanrøkt. Harðskapur er her eingjørd gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menninginga hjá barninum. Vanrøkt er ein ógjørd gerð, sum kann skaða ella sannlíkt skaðar menningina hjá barninum.

### Talva 9: Hvørjar vóru orsøkirnar til fráboðanirnar? 2013 og 2012

| **Vanrøkt** | **2013** | **2012** |
|---|---|---|
| Kenslulig/sálarlig vanrøkt | 119 | 153 |
| Vanrøkt í sambandi við umsjón og eftirlit | 67 | 67 |
| Vanrøkt í sambandi við skúlagongd | 16 | 21 |
| Likamlig vanrøkt | 3 | 5 |
| Tilsamans | 205 | 246 |
| **Harðskapur** | | |
| Kensluligur/sálarligur harðskapur | 35 | 30 |
| Likamligur harðskapur | 26 | 10 |
| Kynsligur harðskapur (ágangur) | 20 | 8 |
| Tilsamans | 81 | 48 |
| **Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda, § 14, stk. 3** | | |
| Heilsa ella lív hjá ófødda barninum í vanda, § 14, stk. 3 | 3 | 5 |
| Tilsamans | 3 | 5 |
| **Hættislig atferð hjá barninum** | | |
| Barnið hevur trupulleikar í skúlanum og vanrøkir skúlan | 35 | 28 |
| Barnið setir egna heilsu og menning í vanda | 28 | 15 |
| Misgerðir hjá barni, t.d kemur ikki til hús ásetta tíð | 9 | 6 |
| Barnið fremur likamligan ella kynsligan harðskap | 8 | 5 |
| Barnið nýtir rúsevir/rúsdrekka | 5 | 4 |
| Tilsamans | 85 | 58 |
| | | |
| **Orsøkir til fráboðanir tilsamans** | **374** | **357** |

GG: Til ber at skráseta meira enn eina orsøk til fráboðan fyri hvørt mál.

Sum talva 9 vísir, vórðu eitt sindur fleiri orsøkir til fráboðanir skrásettar í 2013 í mun til árið frammanundan, sum var fyrsta árið, har skrásett varð sambært uppbýtinum í talvuni, nevniliga 374 í mun til 357. Flestu orsøkirnar vóru í bólkinum 'Vanrøkt' eins og í 2012, hóast hesin bólkurin lutfalsliga minkaði nakað, meðan bólkarnir 'Harðskapur' og 'Hættislig atferð hjá barninum' vuksu samsvarandi.

### Talva 10: Kunning og hoyring av barni, § 44. 2013

| **Svar** | **Tal** | **%-býti** |
|---|---|---|
| Nei | 45 | 69,2 |
| Ja | 20 | 30,8 |
| **Íalt** | **65** | **100,0** |

Sambært BVL § 44, stk. 1 skal eitt barn kunnast og hoyrast, um tess menning og búning loyvir tí, og um tað verður mett at vera til frama fyri barnið.

Í 2013 eru skrásett 65 svar til spurningin "Varð tosað við barnið í sambandi við at málið varð kannað, sambært § 44, stk. 1." Sum talva 10 sýnir, varð tosað við barnið í færri enn triðingin av málunum.

# 3. Fígging – kostnaður av barnavernd

Áðrenn barnaverndarlógin kom í gildi, vóru tað, sambært barnaforsorgarlógini, barnaverndarnevndirnar, sum tóku avgerð í barnverndarmálum, meðan landið rindaði útreiðslurnar av málunum. Eitt av endamálunum við lógini var, at fáa greitt fíggjarligt ábyrgdarbýti millum land og kommunur á barnaverndarøkinum. Lógin ásetur tí, at kommunurnar bera kostnaðin av fyribyrgjandi partinum av barnverndarøkinum, og tá børn verða sett til fosturs, meðan landið ber útreiðslurnar, tá børn verða umsorgnaryvirtikin og fara á viðgerðarstovn, men kommunurnar gjalda brúkaragjald.

**Talva 11: Kostnaður av barnaverndarøkinum pr. íbúgva. 2013 og 2012**

| | Barnaverndarøki | Fólkatal | Kostnaður | Kost. Pr. íbúgva (kr.) | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 19.836 | 23.611.389 | 1.190 | 1.096 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 5.705 | 6.805.392 | 1.193 | 1.022 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 5.988 | 5.274.603 | 881 | 669 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 1.517 | 3.508.438 | 2.313 | 1.071 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 2.432 | 1.731.149 | 712 | 535 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 4.787 | 6.635.613 | 1.386 | 905 |
| 7 | BVT, Sandoy | 1.300 | 1.350.663 | 1.039 | 986 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 3.052 | 3.335.616 | 1.093 | 1.139 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 1.930 | 1.189.322 | 616 | 805 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 1.650 | 2.057.609 | 1.247 | 929 |
| **Alt landið** | | **48.197** | **55.499.793** | **1.152** | **968** |

Í 2012 kostaði barnarverndarøkið 46,7 mió. kr. tilsamans fyri allar kommunalu barnaverndartænasturnar. Hesin kostnaður er í 2013 hækkaður við 18,8 prosentum til 55,5 mió. kr.

Kostnaðurin pr. íbúgva var í miðal fyri landið kr. 1.152 í 2013. Tórshavn, Norðoyggjar, Suðuroyar og Suðuroyar sunnara BVT hava á leið sama kostnað av barnaverndarøkinum pr. íbúgva sum landsmiðaltalið. Fuglafjørður og Sandavágur liggja omanfyri landsmiðaltalið í kostnaði. Barnaverndartænasturnar við Skálafjørðin, Sunda kommunu, Sandoy og Eysturkommunu lógu undir landsmiðaltalinum.

Mestan kostnað fyri hvønn íbúgva hevði BVT í Fuglafirði (2.313 kr.), meðan barnaverndartænastan í Eysturkommunu hevði lægsta kostnaðin fyri hvønn íbúgva (616 kr.).

**Talva 12: Kostnaður av barnaverndarøkinum pr. mál. 2013**

| | Barnaverndarøki | Tal av málum | Kostnaður | Kost. Pr. mál (kr.) | 2012 |
|---|---|---|---|---|---|
| 1 | BVT, Tórshavn | 356 | 23.611.389 | 66.324 | 63.378 |
| 2 | BVT, Norðoyggjar | 119 | 6.805.392 | 57.188 | 53.744 |
| 3 | BVT, Skálafjørðurin | 98 | 5.274.603 | 53.872 | 44.866 |
| 4 | BVT, Fuglafjørður | 31 | 3.508.438 | 113.175 | 50.712 |
| 5 | BVT, Sunda kommuna | 36 | 1.731.149 | 48.087 | 29.297 |
| 6 | BVT, Sandavágur | 92 | 6.635.613 | 72.126 | 48.930 |
| 7 | BVT, Sandoy | 23 | 1.350.663 | 58.724 | 68.456 |
| 8 | BVT, Suðuroy | 57 | 3.335.616 | 58.520 | 61.806 |
| 9 | BVT, Eysturkommuna | 36 | 1.189.322 | 33.037 | 41.839 |
| 10 | BVT, Suðuroyar sunnara | 16 | 2.057.609 | 128.601 | 56.269 |
| **Alt landið** | | **864** | **55.499.793** | **64.236** | **55.203** |

Talva 12 vísir miðalkostnaðin av einum barnaverndarmáli. Fyri landið alt kostar hvørt barnaverndarmál sambært talvuni 64.236 kr. í miðal í 2013. Í Tórshavnar kommunu er kostnaðurin fyri hvørt mál á hædd við landsmiðaltalið.

Í Norðoyggjum, við Skálafjørðin, Sunda Kommunu, Suðuroy, Sandoy og Eysturkommunu er kostnaðurin pr. mál lægri enn landsmiðaltalið, meðan hann er hægri í Fuglafirði, Sandavági, og Suðuroyar sunnaru barnaverndartænastu.

Kostnaðurin av barnaverndartænastuni pr. mál er hægstur í Suðuroyar sunnaru barnaverndartænastu, har hann er tvífalt so høgur sum landsmiðaltalið og nærum fýra ferðir so høgur sum í Eysturkommunu, har barnaverndartænastan kostar minst pr. mál.

**Talva 13: Kostnaður av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu,  tús. kr. 2013**

| Barnaverndarøki | Fosturforeldra-skipanin | Fyrisiting | § 15 fyriskipanir | Stovns-útreiðslur | Tilsamans |
|---|---|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 11.594.147 | 5.304.074 | 3.869.086 | 2.844.082 | 23.611.389 |
| BVT, Norðoyggjar | 1.999.980 | 2.274.527 | 1.020.567 | 1.510.317 | 6.805.392 |
| BVT, Skálafjørðurin | 1.065.839 | 1.214.988 | 1.503.276 | 1.490.501 | 5.274.603 |
| BVT, Fuglafjørður | 660.576 | 1.862.842 | 225.886 | 759.133 | 3.508.438 |
| BVT, Sunda kommuna | 426.838 | 942.936 | 361.375 | | 1.731.149 |
| BVT, Sandavágur | 2.806.154 | 833.767 | 2.752.154 | 243.538 | 6.635.613 |
| BVT, Sandoy | 322.239 | 516.547 | 463.332 | 48.545 | 1.350.663 |
| BVT, Suðuroy | 1.842.180 | 1.143.752 | 349.684 | 0 | 3.335.616 |
| BVT, Eysturkommuna | 350.001 | | 839.322 | | 1.189.322 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | 136.289 | 816.343 | 1.104.977 | | 2.057.609 |
| **Alt landið 2013** | **21.204.242** | **14.909.775** | **12.489.659** | **6.896.117** | **55.499.794** |
| **Alt landið 2013 %-býti** | **38,2** | **26,9** | **22,5** | **12,4** | **100,0** |
| Alt landið 2012 | 17.483.082 | 13.150.234 | 11.506.746 | 4.561.416 | 46.701.478 |
| Alt landið 2012 %-býti | 37,4 | 28,2 | 24,6 | 9,8 | 100 |
| Alt landið 2011 | 16.324.226 | 15.218.616 | 8.479.744 | 5.761.663 | 45.784.249 |
| Alt landið 2011 %-býti | 35,7 | 33,2 | 18,5 | 12,6 | 100 |

GG: Av teimum 12.489.659 kr., sum vórðu nýttar til §15 fyriskipanir, eru 2.551.037 kr. nýttar til stk. 7: Umlætting hjá góðkendum fosturforeldrum.

Talva 13 vísir kostnaðin av barnaverndarøkinum, býtt á nýtslu og øki fyri 2013. Til samanberingar er nýtslan fyri alt landið víst fyri árini 2012 og 2011. Meðan kostnaðurin av barnaverndarøkinum tilsamans hevði ein vøkstur frá 2011 til 2012 á 2,0%, vaks samlaði kostnaðurin frá 2012 til 2013 við 18,8 %.

Trý ára tíðarskeiðið 2011-2013 sæst ein skjóting í nýtsluni, soleiðis at parturin, sum verður nýttur til at fyrisita barnaverndartænasturnar, er fallin frá einum triðingi (33,2%) til ein góðan fjórðing (26,9%). Samsvarandi er lutfalsliga meira nýtt til Fosturforeldraskipanina og §15 Fyriskipanir.

Fyrisitingarkostnaður fevnir um:

- kostnað fyri starvsfólk í barnaverndartænastunum
- samsýning til barnaverndarnevndirnar og
- kostnað av rakstrinum av Barnaverndarstovu Føroya.

Í summum økjum eru harumframt sálarfrøðingar íroknaðir í fyrisitingarkostnaðin, tá ið hesir eru í starvi hjá kommununi.

**Talva 14: Stovnsútreiðslur býttar á slag. 2011-2013**

| Útreiðsluslag | 2013 | | 2012 | | 2011 | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Upphædd (kr.) | %-býti | Upphædd (kr.) | %-býti | Upphædd (kr.) | %-býti |
| Bú- og viðgerðarstovnar í Føroyum | 6.160.564 | 89,3 | 3.859.260 | 84,6 | 3.044.194 | 52,8 |
| Eftirskúlar uttanlands | 264.022 | 3,8 | 413.813 | 9,1 | 1.826.206 | 31,7 |
| Skúlagongd í Føroyum | 76.600 | 1,1 | 23.365 | 0,5 | 27.400 | 0,5 |
| Bú- og viðgerðarstovnar uttanlands | 366.927 | 5,3 | 211.690 | 4,6 | 812.274 | 14,1 |
| Útreiðslur í sambandi við samveru | 28.003 | 0,4 | 53.288 | 1,2 | 51.588 | 0,9 |
| Tilsamans | 6.896.117 | 100,0 | 4.561.416 | 100,0 | 5.761.663 | 100,0 |

Sambært talvu 14 lækkaðu stovnsútreiðslurnar í 2012 í mun til 2011 við einum fimtingi. Lækkingin stavaði frá minni nýtslu til eftirskúlar, bú- og viðgerðarstovnar uttanlands. Harafturímóti hækkaði brúkaragjald til bú- og viðgerðarstovnar í Føroyum munandi tá.

Lækkingin í stovnsútreiðslum tilsamans er í 2013 vend til eina hækking á 51% í mun til 2012. Hækkingin stavar mestsum øll frá hægri útreiðslum til Bú- og viðgerðarstovnar, serliga í Føroyum. Frá 1. januar 2013 hækkaði brúkaragjaldið fyri børn og ung á stovni sambært Kunngerð nr. 110 frá 19. november 2012. Í roynd og veru er talan um eina tvífaldan av hesum útreiðslum.

Kostnaðurin at senda børn á viðgerðarstovn er ein landsútreiðsla, men barnaverndartænasturnar rinda eitt brúkaragjald, sum Almannamálaráðið, sambært kunngerð, ásetur árliga.

Gongdin í tíðarskeiðnum 2011-2013 tykist vera, at alsamt fleiri børn og ung koma á stovn í Føroyum heldur enn uttanlands. Meðan nærum helmingurin av stovnsútreiðslunum í 2011 fór til stovnar og skúlar uttanlands, er hesin partur í 2013 minkaður til minni enn ein tíggjundapart.

**Talva 15: Fosturforeldraskipanin. Kostnaður 2012-2013**

| Útreiðsluslag | 2013 | | 2012 | |
|---|---|---|---|---|
| | Upphædd | %-býti | Upphædd | %-býti |
| Samsýning til fostur/umlættingarforeldur | 19.059.230 | 80,2 | 15.821.598 | 86,2 |
| Vistarhald/klæðir | 1.966.554 | 8,3 | 1.559.586 | 8,5 |
| Stovnsgjald aðrar kommunur | 1.991.985 | 8,4 | 688.558 | 3,8 |
| Almenn gjøld | 354.191 | 1,5 | 0 | 0,0 |
| Lummapeningur til barnið | 267.609 | 1,1 | 215.623 | 1,2 |
| Stovnan og útbúnaður | 115.710 | 0,5 | 64.026 | 0,3 |
| Ráðgeving til fosturforeldur | 0 | 0,0 | 6.250 | 0,0 |
| **Tilsamans** | **23.755.279** | **100,0** | **18.355.641** | **100,0** |

GG: Uppí upphæddina á 19.059.230 kr. til 'Samsýning til fostur/umlættingarforeldur' eru tiknar við 2.551.037 kr. frá § 15 stk. 7: Umlættting hjá góðkendum fosturforeldrum.

Sum talva 15 sýnir, hækkaðu útreiðslurnar av fosturforeldraskipanini við uml. 5,4 mió. kr. frá 2012 til 2013. Meginparturin av hesi hækking stavar frá samsýning til fosturforeldur og umlættingarforeldur.

Nógv tann størsti parturin (80,2%) av útreiðslunum til Fosturforeldraskipanina var aftur í 2013 samsýning til fosturforeldur, sí talvu 15, sum vísir kostnaðin av forsturforeldraskipanini, býttan á útreiðsluslag. Støddin á

samsýningini til fosturforeldur verður ásett í kunngerð frá Almannamálaráðnum og við atliti til, hvussu krevjandi uppgávan er. Hædd verður millum annað tikin fyri aldri á barni, og um møguligt er at hava annað arbeiði eisini.

Tað er Fosturforeldraskipanin hjá Barnaverndarstovuni, sum veitir fosturforeldrum ráðgeving. Hetta verður gjørt við regluliga at skipa fyri fakligum skeiðum og útbúgving til fosturforeldur. Fosturforeldraskipanin hevur eisini fastar supervisjónsbólkar fyri fosturforeldur. Harumframt er møguleiki at fáa ráðgeving og supervisjón hjá sálarfrøðingi og familjuráðgeva á Barnaverndarstovuni eftir tørvi.

**Talva 16: BVL § 15 - fyribyrgjandi fyriskipanir. Kostnaður 2012-2013**

| Útreiðsluslag | 2013 Upphædd | 2013 %-býti | 2012 Upphædd | 2012 %-býti |
|---|---|---|---|---|
| Sálarfrøðilig hjálp | 2.061.409 | 20,7 | 2.445.987 | 23,0 |
| Familjuviðg. ella líknandi stuðul | 2.954.906 | 29,7 | 3.056.115 | 28,7 |
| Stuðul í heiminum | 2.038.573 | 20,5 | 2.788.774 | 26,2 |
| Sosialt ansingarpláss | 723.209 | 7,3 | 942.169 | 8,9 |
| Arbeiðsroynd ella líknandi | 521.831 | 5,3 | 406.473 | 3,8 |
| Menna frítíðarvirksemi hjá barninum | 54.637 | 0,5 | 90.835 | 0,9 |
| Sjúku-/ ella misnýtsluviðgerð | 42.769 | 0,4 | 130.087 | 1,2 |
| Persónligur ráðgevi/stuðul til barnið | 1.437.130 | 14,5 | 706.561 | 6,6 |
| Stuðul í egnum kamari/íbúð | 104.157 | 1,0 | 67.187 | 0,6 |
| **Tilsamans** | **9.938.622** | **100,0** | **10.634.188** | **100,0** |

GG: §15 fyriskipan stk. 7: Umlættting hjá góðkendum fosturforeldrum er ikki tikin við í hesi talvu, tí upphæddin á 2.551.037 kr. er tald uppí 'Samsýning til fostur/umlættingarforeldur' í talvuni frammanfyri.

Talva 16 vísir, at útreiðslurnar til fyribyrjgandi fyriskipanir sambært BVL § 15 eru lækkaðar eitt sindur (6,5%) frá 2012 til 2013. Størstu útreiðslupostarnir eru til familjuviðgerð, stuðul í heiminum og sálarfrøðiliga hjálp. Hesar tríggjar fyriskipanir sambært § 15 í barnaverndarlógini standa í 2013 tilsamans fyri 70,9% av útreiðslunum, sum verða latnar eftir greinini, hóast allar eru lækkaðar í mun til 2012, bæði lutfalsliga og í krónum. Útreiðslurnar til fyriskipanirnar 'Persónligur ráðgevi/Stuðul til barnið' og 'Arbeiðsroynd ella líknandi' eru hækkaðar.

Møguleikarnir at veita børnum og familjum hjálp eftir barnaverndarlógini eru nógvir. Á talvuni sæst yvirlit yvir ymiskar fyriskipanir. Høvuðsreglan er, at um barnið hevur gagn av tí, so er grundarlag fyri eini fyriskipan.

Fyribyrgjandi fyriskipanirnar sambært § 15 í barnaverndarlógini eru størsti parturin av barnaverndararbeiðinum. Bert í teimum førum tá fyribyrgjandi fyriskipanunum ikki geva einum barni ella familju nøktandi hjálp, kann verða farið víðari til aðrar og meira víðgongdar fyriskipanir. Slíkar fyriskipanir kunnu m.a. vera at seta barnið heiman í fosturheim ella á stovn. Flestu avgerðir, um at flyta barnið úr heiminum, verða tiknar við samtykki frá foreldrunum. Hóast samtykki er fingið til vega, skal málið leggjast fyri Høvuðsbarnaverndarnevndina til støðutakan. Hetta kemst av, at við nýggju barnaverndarlógini varð mett neyðugt at styrkja rættartrygdina hjá børnum og foreldrum.

# 4. Fosturforeldraskipanin

Kommunurnar stovnsettu eina fosturforeldraskipan fyri alt landið, tá tær settu Barnaverndarstovu Føroya á stovn í 2006. Fosturforeldraskipanin er ein týðandi partur av virkseminum á Barnaverndarstovuni.

Tá umstøðurnar í heiminum eru soleiðis, at tað ikki ber til hjá einum barni at verða búgvandi heima, verður kannað, um barnið kann setast í eina fosturfamilju. Atlit skulu fyrst takast til, um næstrarfólk kunnu góðkennast sum fosturfamilja.

Eitt fosturheim er, sambært barnaverndarlógini, tá ið eitt barn verður sett heiman í eitt annað heim, har fosturforeldur hava umsorgan fyri tí í styttri ella longri tíðarskeið. Talan kann m.a. vera um umlætting, bráðfeingis fosturheim og fosturheim, har børn verða sett fyribils ella varandi til fosturs.

Eitt barn kann setast til fosturs, tá ið:

1) foreldrini samtykkja, at barnið verður sett í fosturheim
2) barnið ongan verja hevur
3) barnið fyribils er undir barnaverndarnevndarinnar umsorgan uttan foreldranna samtykki.

Barnaverndarstova Føroya, Fosturforeldraskipanin, fær frá barnaverndartænastunum upplýsingar um barnið, og um hvønn tørv, barnið hevur, og skal so finna røttu fosturfamiljuna til barnið.

Fosturforeldraskipanin hevur í løtuni 93 góðkendar fosturfamiljur, sum hava børn til fosturs ella eru klár at taka ímóti børnum til fosturs ella umlætting.

Umráðandi er at finna eina familju, sum hóskar best til tað einstaka barnið. Fosturforeldraskipanin hevur tí fleiri fosturfamiljur í skipanini, sum enn ikki hava børn. Tað kunnu vera ymisk viðurskifti, sum gera, at tað einstaka barnið ikki hóskar til hesar fosturfamiljur.

Eisini eru fleiri fosturfamiljur, sum verða nýttar til fleiri fyriskipanir. Til dømis, tá talan er um systkin, ella tá tað snýr seg um umlættingarfamiljur, sum hava fleiri børn í styttri tíðarskeið í senn.

Í 2013 komu 22 nýggjar umsóknir inn til Fosturforeldraskipanina, sum allar vórðu góðkendar. Av hesum 22 umsóknunum snúðu 19 umsóknir seg um eitt ávíst barn, tað vil siga, at talan var um netverksfosturfamiljur, sum á ein ella annan hátt framman undan hava tilknýtið til barnið.

## Talva 17: Tal av børnum til fosturs 31. desember 2013 – býtt eftir aldri

| Barnaverndarøki | 0-6 | 7-13 | 14-18 | 19-20 | Tils. | Herav netverk |
|---|---|---|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 6 | 16 | 11 | 2 | 35 | 6 |
| BVT, Norðoyggjar | 2 | 4 | | | 6 | 1 |
| BVT, Skálafjørðurin | | | 2 | | 2 | |
| BVT, Fuglafjørður | | 1 | 2 | | 3 | |
| BVT, Sunda kommuna | | 2 | | | 2 | 1 |
| BVT, Sandavágur | 2 | 3 | 5 | 3 | 13 | 6 |
| BVT, Sandoy | | | 1 | 1 | 2 | |
| BVT, Suðuroy | 3 | 1 | 2 | | 6 | 2 |
| BVT, Eysturkommuna | 1 | | | | 1 | |
| BVT, Suðuroyar sunnara | | | 2 | | 2 | |
| **Alt landið** | **14** | **27** | **25** | **6** | **72** | **16** |

Tilsamans 72 børn vóru til fosturs í Føroyum við árslok 2013. Av hesum var umleið helmingurin í Tórshavnar kommunu. 16 av fosturbørnunum, svarandi til gott og væl fimta hvørt fosturbarn, vóru til fosturs hjá fólki, sum eru í familju við barnið ella á annan hátt partur av netverkinum hjá barninum. Hetta er sama mynstur sum árið fyri, har samanlagt 68 børn vóru til fosturs, harav 15 vóru hjá næstringum.

## Talva 18: Tal av børnum til fosturs 31. desember 2013 - býtt eftir aldri og kyni

| | 0-6 | | 7-13 | | 14-18 | | 19-20 | | Tils. | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Barnaverndarøki** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **Tils.** |
| BVT, Tórshavn | 6 | | 14 | 2 | 5 | 6 | 1 | 1 | 26 | 9 | 35 |
| BVT, Norðoyggjar | 1 | 1 | 3 | 1 | | | | | 4 | 2 | 6 |
| BVT, Skálafjørðurin | | | | | | 2 | | | 0 | 2 | 2 |
| BVT, Fuglafjørður | | | | 1 | 2 | | | | 2 | 1 | 3 |
| BVT, Sunda kommuna | | | 1 | 1 | | | | | 1 | 1 | 2 |
| BVT, Sandavágur | | 2 | 1 | 2 | 2 | 3 | | 3 | 3 | 10 | 13 |
| BVT, Sandoy | | | | | | 1 | 1 | | 1 | 1 | 2 |
| BVT, Suðuroy | 2 | 1 | | 1 | 1 | 1 | | | 3 | 3 | 6 |
| BVT, Eysturkommuna | | 1 | | | | | | | 0 | 1 | 1 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | | | | | 1 | 1 | | | 1 | 1 | 2 |
| **Alt landið** | **9** | **5** | **19** | **8** | **11** | **14** | **2** | **4** | **41** | **31** | **72** |

Býtið millum dreingir og gentur, sum eru sett til fosturs við árslok 2013, vísir eina yvirvág av dreingjum fyri alt landið, nevnliga 41 dreingir og 31 gentur. Kynsbýtið í aldursbólkunum vísir, at fleiri dreingir enn gentur eru til fosturs í teimum báðum yngstu aldursbólkunum, meðan fleiri gentur enn dreingir eru í aldursbólkinum 14-18 ár. Hetta mynstrið sást eisini árið fyri.

**Talva 19: Tal av børnum til umlættingar 31. desember 2013 – býtt eftir aldri**

| Barnaverndarøki | 0-6 | 7-13 | 14-18 | 19-20 | Tils. |
|---|---|---|---|---|---|
| BVT, Tórshavn | 3 | 12 | 4 | | 19 |
| BVT, Norðoyggjar | 1 | 4 | | | 5 |
| BVT, Skálafjørðurin | 5 | 3 | | | 8 |
| BVT, Fuglafjørður | | | | | |
| BVT, Sunda kommuna | 1 | 2 | | | 3 |
| BVT, Sandavágur | | 4 | 2 | 1 | 7 |
| BVT, Sandoy | | 2 | | | 2 |
| BVT, Suðuroy | | | 1 | | 1 |
| BVT, Eysturkommuna | 1 | | | | 1 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | | | | | |
| **Alt landið** | **11** | **27** | **7** | **1** | **46** |

Talva 19 vísir, hvussu nógv børn vóru til umlættingar við árslok 2013. Tilsamans 46 børn vóru til umlættingar, og meira enn helvtin av hesum var í aldursbólkinum 7 til 13 ár.

Tá ið viðurskiftini í heiminum ella hjá barninum eru soleiðis, at ikki er neyðugt at seta tey til fosturs, men tørvur kortini er á umlætting, kunnu børnini koma í eina fosturfamilju til umlættingar. Hetta merkir, at tey í styttri tíðarskeið búgva hjá fosturfamiljuni, men eru ikki umsorganaryvirtikin, og foreldrini hava framvegis foreldramyndugleikan og ábyrgdina av børnunum.

Mest vanligt er, at børnini eru eitt ella tvey vikuskifti um mánaðin til umlættingar, men talan kann eisini vera um eitt ávíst tíðarskeið, meðan foreldrini eitt nú fáa viðgerð fyri misnýtslu og líknandi.

Ætlanin við umlætting er, at geva børnum og foreldrum nýggja orku. Koma børnini frá eini familju, sum ikki er so vælvirkandi á øllum økjum, kunnu tey síggja og kenna seg sum part av eini vælvirkandi familju, sum kann geva teimum umsorgan og upplivingar.

Tað kann vera trupult at finna fosturfamiljur til umlættingarfyriskipanir. Hetta er eitt orku- og tíðarkrevjandi arbeiði fyri fosturforeldraskipanina. Tað, at finna eina fosturfamilju til eitt barn, sum skal í umlætting, kann ofta hava við sær, at Fosturforeldraskipanin skal vitja fleiri fosturfamiljur, áðrenn rætta fosturfamiljan verður funnin.

Umlætting er ein sjálvboðin fyribyrgjandi fyriskipan, skilt á tann hátt, at barnið ella familjan kann broyta hugsan, eftir at fosturfamiljan er funnin og ikki ynskja umlætting kortini. Møguligt er ikki at seta í verk umlætting uttan samtykki frá tí foreldrinum, sum hevur foreldramyndugleikan.

**Talva 20: Tal av børnum til umlættingar 31. desember 2013 – býtt eftir aldri og kyni**

| | 0-6 | | 7-13 | | 14-18 | | 19-20 | | íalt | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Barnaverndarøki** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **M** | **K** | **íalt** |
| BVT, Tórshavn | 2 | 1 | 6 | 6 | 3 | 1 | | | 11 | 8 | 19 |
| BVT, Norðoyggjar | | 1 | 2 | 2 | | | | | 2 | 3 | 5 |
| BVT, Skálafjørðurin | 2 | 3 | 2 | 1 | | | | | 4 | 4 | 8 |
| BVT, Fuglafjørður | | | | | | | | | | | |
| BVT, Sunda kommuna | | 1 | 1 | 1 | | | | | 1 | 2 | 3 |
| BVT, Sandavágur | | | 1 | 3 | | 2 | | 1 | 1 | 6 | 7 |
| BVT, Sandoy | | | 2 | | | | | | 2 | 0 | 2 |
| BVT, Suðuroy | | | | | 1 | | | | 1 | 0 | 1 |
| BVT, Eysturkommuna | | 1 | | | | | | | 0 | 1 | 1 |
| BVT, Suðuroyar sunnara | | | | | | | | | | | |
| **Alt landið** | **4** | **7** | **14** | **13** | **4** | **3** | | **1** | **22** | **24** | **46** |

Fyriskipanin umlætting verður mest nýtt til aldursbólkin 7- 13 ára gomul. Um ársskiftið 2013/2014 vóru 22 dreingir og 24 gentur til umlættingar. Tórshavnar barnaverndartænasta hevur nógv flest børn í umlætting. 19 av teimum tilsamans 46 børnunum vóru úr Tórshavnar BVT, men hetta svarar væl við fólkatalið sum heild.

# 6. Mannagongd og grundarlag

Tann 1. januar 2006 kom nýggja barnaverndarlógin í gildi, og við henni varð Barnaverndarstova Føroya sett á stovn. Uppgávan hjá Barnaverndarstovu Føroya er m.a.:

- at umsita fosturforeldraskipanina
- at veita barnaverndartænastum holla vegleiðing og ráðgeving
- at virka sum ráðgevi hjá landsstýriskvinnuni á barnaverndarøkinum
- at styrkja og samskipa barnaverndarøkið
- og at fáa til vega hagtøl og skipa fyri gransking og menning av økinum

Síðan Barnaverndarstova Føroya varð sett á stovn, hevur verið arbeitt miðvíst við at fáa til vega hagtalstilfar. Byrjað varð við at savna inn tilfar manuelt frá øllum barnaverndartænastunum í landinum. Barnaverndarstova Føroya hevur síðan í tøttum samstarvi við barnaverndartænasturnar ment eina elektroniska hagtalsskipan, sum tølini í hesi frágreiðing eru tikin úr.

Barnaverndartænasturnar tøppa inn í hagtalsskipanina upplýsingar um tey barnaverndarmál í hvørjum øki sær, m.a. hvørjar fyriskipanir verða settar í verk, hvørjir trupulleikar eru, og hvør kostnaðurin í tí einstaka barnaverndarmálinum er. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini eru tær, sum barnaverndartænasturnar saman við Barnaverndarstovu Føroya meta vera av týdningi fyri at fáa innlit í barnaverndarøkið í Føroyum. Í hagtalsskipanini eru nógv fleiri upplýsingar, enn henda frágreiðing leggur fram.

Tá talan er um barnaverndarmál, er talan um sera privatar og viðkvæmar upplýsingar, umframt revsiverd viðurskifti. Dátueftirlitið hevur, við heimild í § 35, stk. 1, smb. § 9, stk. 1 og § 10, stk.1 í persónsupplýsingarlógini, givið loyvi til, at Barnaverndarstova Føroya kann viðgera viðkvæmar persónsupplýsingar í tilknýti til hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovuni. Loyvið til viðgerðina av persónsupplýsingum er treytað av, at ásetingarnar í løgtingslóg nr. 73 frá 8. mai 2001 um viðgerð av persónsupplýsingum, við seinni gjørdum broytingum, og kunngerð nr. 28 frá 27. februar 2003 um trygd í samband við persónsupplýsingar, verða hildnar.

**Endamál**

Endamálið við hagtalsskipanini er at betra um grundarlagið fyri avgerðum á barnaverndarøkinum.

Umframt hetta hevur hagtalsskipanin eisini til endamáls at geva leiðslunum, ið varða av barnaverndarøkinum í Føroyum, eina mynd av støðuni í einstøku barnaverndartænastunum við atliti til menning og betran. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu eisini nýtast sum grundarlag hjá kommununum, tá tær leggja til rættis kommunalpolitikkin.

Tá barnaverndarlógin varð sett í gildi 1. januar 2006, varð skylda áløgd øllum barnaverndartænastunum í landinum at lata upplýsingar um barnaverndarmál til Barnaverndarstovu Føroya. Barnaverndarstovan hevur ábyrgdina av hagtalsskipanini og hevur saman við KT-tænastuni hjá Tórshavnar kommunu sett upp eina trygga KT-skipan. Tann barnaverndartænastan, sum hevur eitt barnaverndarmál, hevur skyldu til at skráseta málið og tær hendingar, sum eru í málinum til Barnaverndarstovu Føroya. Til allar skrásetingar verður P-talið hjá barninum nýtt. Umframt at skráseta viðurskifti hjá barninum, verða eisini skrásettar upplýsingar um tann, ið hevur foreldramyndugleikan yvir barninum.

**Trygd**

Nógv verður gjørt burturúr, at hagtalsskipanin hjá Barnaverndarstovu Føroya skal vera so trygg sum møguligt fyri at tryggja, at skrásettu upplýsingarnar ikki koma óviðkomandi í hendi. Upplýsingarnar í hagtalsskipanini kunnu einans nýtast til hagtals- og vísindalig endamál.

Hagtalsskipanin er m.a. tryggjað við einari trygdarváttan og eini kryptering í sambandi við ta elektronisku flytanina av data. Harumframt er dataviðgerðin fevnd av tekniskum og umsitingarligum trygdarkrøvum, soleiðis, at hvørt einstakt starvsfólk, sum arbeiðir við hagtalsskipanini, hevur fleiri persónligar kotur til skipanina. Skrásett verður eisini, hvør er inni á skipanini og nær, og hvat skipanin verður nýtt til. Somuleiðis er stórur dentur lagdur á, at eisini starvsfólkini í einstøku barnaverndartænastunum vísa umhugsni og ansni í sambandi við hagtalsarbeiðið.

**Óvissur**

Barnaverndartænasturnar í landinum byrjaðu at tøppa inn í hagtalsskipanina hjá Barnaverndarstovu Føroya í 2008. Av tí at neyðugt var við eini royndartíð og upplæring fyri at tryggja, at skrásetingarnar verða gjørdar á sama hátt í øllum barnaverndartænastunum, varð ikki ráðiligt at almannakunngera hagtøl úr skipanini í 2008. 2009 var fyrsta árið, at Barnaverndarstova Føroya nýtti upplýsingar úr elektronisku hagtalsskipanini. Sjálvt um hugt hevur verið gjølla eftir, at upplýsingar í skipanini eru rætt inntøppaðar, kann full vissa ikki gevast fyri, at ongin villa er í upplýsingunum. Fyri at tryggja, at upplýsingarnar í hesi frágreiðing eru rættar, er hendan frágreiðing send øllum barnaverndartænastunum til ummælis, gjøgnumgongd og góðkenningar, áðrenn hon er almannakunngjørd. Eftir at tølini vóru liðugt viðgjørd, hava tvey økir gjørt vart við, at einstøk mál, sum eru flutt millum kommunur, ikki eru tald við fyri teirra øki. Hetta skyldast lutvíst skeiva skráseting og lutvíst ein veikleika í hagtalsskipanini, sum ikki áður hevur havt týdning. Fyri yvirskipaðu myndina av barnaverndarøkinum hava hesi einstøku mál tó ikki týdning.

Barnaverdarstova Føroya juli 2014

Oddbjørg Balle, leiðari